# PUNKTUM.FO




Við løgreglufylgi fóru teir brølandi eftir Malecón, meðan kubanar stóðu og veittraðu. Fróði Magnussen fekk bøllar av stáli, tá hann saman við øðrum motorsúkklufjepparum var á ferð á Kuba

## Á ferð í Castro-landi á Harley

SEV-stjórin um grøna orku:
- Nú er nóg mikið tosað
Síða 2

Uni Arge:
- Politiska skipanin er seinfør
Síða 4

Ferðaportrett:: 200 metrar millum Milano og Teheran
Síða 8










*1. Ein amerikonsk Harley framman fyri standmynd av Che Guevara*
*2. Niels Pauli, Gunnar, Fróði, Ove og - liggjandi framman fyri - William*
*3. En gomul Harley og ein gamal amerikanskur bilur*

# Við Harley



Fróði Magnussen
redaktion@dimma.fo

**Eitt fríggjakvøld i februar møttust fýra ferðabúnir menn á flogvøllinum í Vágum.**
**Mánaðir frammanundan høvdu teir fylt eina bingju við potentum Harley Davidson-dýrum, sum var farin undan teimum til Havana á Kuba.Nú var bara eftir at savna norska, danska, týska og føroyska ferðalagið og seta kósina móti Kuba, motor-súklunum og einum iva-somum krokodillubúffi...**

## Hotel Palco.

Fimmstjørnaða hotellið var nakað fyri seg. Allir hentleikar, marmor á gólvi og veggi og einum hyli, ið slokti sær eftir allari gongini. Í stødd var hylurin sum eitt størri føroyskt alibrúk, og í honum svumu væl gøddir gullfiskar, áleið líka stórir, sum ein miðal hampa bankatoskur.

Dagin eftir fóru vit tann skyldbundna busstúrin runt Havana, har vit skuldu síggja tað, ein má og skal hava sæð.

Uppreistrarvaglið, har Fidel heldur sínar langu røður. Sølutorgið, har ferðafólk keypir tinganeyst. Bygningar hjá stjórnarumsitingini.
Kongresbygningurin (Capitolio), sum er eitt kopi av amerikanska kongressbygninginum. Vegin 5th avenu, strandarvegin, ið vit kenna frá myndunum, tá Kubakreppan var í hæddini og luftverjukanónir klæddu hvønn tanga.

Havana var gimsteinurin í tí spanska ríkinum og var ein sera ríkur býur, tí allur flutningur úr Latínamerika til Spania varð skipaður umvegis Havana, og hetta sæst aftur á teimum gomlu bygningunum.

## Bleikir føroyingar í bakandi sól

Eftir at vit høvdu heintað kubansku nummarpláturnar, sum kravdust, gekk leiðin til eitt ídnaðarøki, har bingjurnar við motorsúkklunum stóðu.

Her merktu vit av álvara tað ótrúliga beinasemið og hjálpsemið hjá kubanarum, men ikki minst tað mekaniska handalag, teir hava. Var eitthvørt, so varð hetta umvælt við snildi, og tað, at teir bæði manglaðu amboð og eykalutir, darvaði teimum ikki.

Nú vit riggaðu til, vóru vit noydd at vera úti í sólini, og hitin var meinur.

Onkur hevði trupulleikar av, at akkumulatorurin var tómur, so hesar súkklurnar máttur rullast í gongd, og í hesum hitanum var avbjóðingin øgilig. Eftir lítlari løtu kundi vindast úr hvørjum plaggi.

Føroyingarnir høvdu sproytað olju á súkklurnar fyri at verja tær móti rusti, men at fáa hesa av aftur, var lættari sagt enn gjørt.

Eftir tógvið stríð vórðu vit fýra klárir og høvdu ætlanir um at koyra á hotellið undan hinum.

## Eingi vegaskelti

Vit staðfestu tó skjótt, at kubanar ikki brúka nógva orku uppá vegaskeltir.

At koyra runt í Havana, ein býur við 2,2 milliónum íbúgvarum, har nærum eingi vegaskelti eru, er ein størri avbjóðing, enn vit vildu taka á okkum á fyrsta dagin, so har var einki annað at gera ein at vera tolin.

Vit styttu okkum um løtuna við at hyggja eftir akførunum hjá kubanarum.

Einki av hesum akførum er yngri enn 1959 (tá Castro-stýrið tók við), og vit staðfestu, at manglandi eykalutir merktu hesi. Kubanar høvdu gjørt eykalutir úr alskyns lutum, og lutir av russiskum traktorum vóru væl umboðaðir. Ikki tí, fleiri av hesum akførum vóru sera vøkur. Luís, ein kubani, sum umframt sítt almenna arbeiði eisini var Harley-Davidson mekanikari, hevði eina Harley-Davidson Knucklehead frá 1947.

Á hesari vísti hann veg nærum allar 2.000 kilometrarnar, sum vit tilsamans koyrdu á Kuba.

Ná, men leiðin gekk til Hotell Palco og eftir at hava skavað tann ringasta skittin av okkum, koyrdu vit down town Havana til eina matstovu, ið verður nevnd La Guarida. Matstovur á Kuba, sum eru á privatum hondum, hava ikki loyvi til at hava fleiri enn 12 sitipláss, men henda hevði eitt høli aftanfyri, har vit øll passaðu inn.

Umframt ferðalagið, so vóru nakrir kubanar við, so tilsamans vóru vit omanfyri 40.

At koyra mitt inn í Havana millum trongar gøtur og inná stórar fleirsporaðar vegir við einum so stórum fylgi er nakað fyri seg, og hevði løgreglan ikki hjálp okkum, høvdu vit ikki komið so lættliga ígjøgnum ferðsluna. Við løgreglufylgi koyrdu vit sum eitt annað forsetafylgi norður eftir Malecón, har kubanar stóðu og veittraðu til okkara.

## Castro leggur frá sær

Triðja dagin fóru vit til Viñales. Okkara kubansku vinir leiddu okkum á leið, tí har var ikki eitt einasta skelti, sum vísti veg.

Vit koyrdu gjøgnum eitt sera vakurt landslag við fjøllum, har allur vøkstur var avbera stórur. Steðgað varð við eitt hellið - inni har var ein barr. Eftir hetta gingu vit gjøgnum eitt dryppsteinahellið yvir til eina matstovu, har vit fingu okkum ein lítlan bita. Meðan vit sita soleiðis og hugna okkum, fór at regna.

Vit føroyingar høvdu fyrireikað okkum til túrin, men tropiskt regn var ikki við í ætlanini, so meðan væl fyrireikaðir týskarar lótu seg í regnklæðir, settu vit okkum uppá okkara hjólhestar og hildu leiðina fram til hotellið, ið lá 4 km frá staðnum, har vit ótu.

Sjáldan hava vit verið so vátir, men vatnið var heitt, so hesa minuttirnar, vit koyrdu, gjørdu ikki tað stóra – verri er at koyra í tímar við tropiskum regni, men tað koma vit aftur til.

Tá vit komu á hotellið, fingu vit at vita, at Fidel Castro í blaðnum "Grandam" hevði boðað frá, at hann ikki ynskti at stilla upp aftur til tjóðarting, "tí tað er at svíkja uppreisturin at sita við valdið, tá tú ikki ert førur fyri tað".

Fjóra dagin koyra vit til veggjamálningin "Mural de la Prehistoria".

Hetta er ein málningur, sum er 120 metrar til hæddar og 180 metrar til víddar, og av tí at sólin stendur beint inná hann, má málningurin áhaldandi viðlíkahaldast.

Málningurin varð í síni tíð bílagdur av Fidel Castro sjálvum og skal ímynda menningina av tí fullkomna sosialistiska menniskjanum heilt frá uppruna skríðdýrum, ið komu úr havinum.

## Anarkistisk ferðsla

Fimta dagin fara vit ein túr til vestara partin av "del Pinar del Rio".

Ávegis koyra vit framvið sementvirkinum á Kuba, og vit muga bara staðfesta, at ferðsluviðurskiftini her á leið eru ikki sum um okkara leiðir.

Ein stórur bilur er ávegis inn á virkið, meðan ein annar er á veg út, hvørgin vil víkja, og meðan hesir soleiðis standa og royna kreftir, koma langar bíðiraðir. Hetta merkir aftur, at bardagahanarnir ikki fáa flutt bilarnar, tá teir at enda eru samdir um, hvør er sterkari. Ferðslan er so tøtt, at sjálvt vit á motorsúkklum sleppa ikki ígjøgnum. Løgregla má til, og tá hon hevur greitt ferðslufløkjuna, halda vit fram, og ætlanin er at steðga á við tjóðarparkina "Las Terrazas", har møguleiki er at svala sær á í fossunum.

Staðið er sera vakurt og kann illa lýsast við orðum, men gjaldsvegurin til staðið var vissuliga evni til umhugsan. Gjaldsvegurin var so vánaligur, at sjálvt jepparnir, sum koyra nyttuleyst á Havnargøtum høvdu formátt sær lítið á hesum vegastrekki. Heyggjarnir á vegnum vóru so stórir, at ein ivaðist í, um teir vóru íbygdir, og holini so stór, at tú mátti hava eitt kort yvir økið fyri at finna úr teimum aftur. Meðan vit soleiðis royna at sníkja okkum fram eftir vegnum, rennur einum til hugs at "alt skal gjaldast so ella so", og at munurin á liberalismu og sosialismu er, at við liberalismu veit ein áleið, hvat mann fær afturfyri, tá ein rindar fyri okkurt, meðan við blóðreyðari sosialismu (sum er kryddað við einaveldi), hevur ein ikki hóming av, hvat mann fær afturfyri gjaldið.

Tá vit koma aftur til hotellið, hevur hitin aftur gjørt um seg, og fleiri eru útlúgvað. Tey flestu velja at eta okkurt á hotellinum og fara síðan beint til songar.

## Brølarin í Svínavíkini

Sætta dagin fóru vit ein sera spennandi túr til "Bahia de Cochinos", eisini kallað Svínavíkin, har útlagnir kubanar í 1961 gjørdu landgongd.

Áðrenn vit komu til Svínavíkina, steðgaðu vit við ein krokodillugarð. Vit royndu krokodillukjøt, men vit føroyingar hildu, at vit høvdu etið betri bita.

Í Svínavíkini er eitt savn og minnismerki, ið lýsir, hvat hendi í 1961.

Í stuttum er søgan tann, at







*4. Sonur Che Guevara fær føroyska Merkið*
*5. Føroyingar á Harley Davidsson á kubanskum asfalti*
*6. Fróði, Gunnar og Ove á yndiskaféini hjá Hemingway. Á bróstinum ein mynd av Castro og Hemingway*

# á Kuba

umleið 1400 útlagnir kubanar, sum vóru stuðlaðir av CIA, komu í land á staðnum. Innrásin miseydnaðist, og kubanar niðurbardu innrásina. Nógvar eftirmetingar eru síðan gjørdar um, hvat og hvussu, men ein óvísundalig eftirmeting frá mínari síðu er hon, at CIA gjørdi tveir brølarar, og at hesir kostaðu teimum dýrt.

Tann fyrri er at undirmeta tann fólksliga stuðul, sum Castro og hansara stýrið hevði. Innan álopið á Kuba sendi CIA stríðsflogfør yvir Kuba fyri at oyða tað kubanska flogvápnið, og tann seinri feilurin er, at CIA helt, at endamálið varð rokkið, og at tað kubanska flogvápnið varð oytt.

Tá so herskipini fóru avstað fyri at gera innrás á Kuba, høvdu hesi ikki loftverjukanónir við. Kubanar høvdu tó trý flogfør, og tvey av hesum bumbaðu tey verjuleysu skipini, so nøkur fóru á land, meðan onnur flýddu.

Eftir stóðu 1400 mans á landi, uttan møguleika at fáa nakran stuðul. Eftir hendingina varð Fidel Castro spurdur um, hvat hann hevði gjørt, um hann hevði mist hesi trý flogførini. Hann svaraði róliga, at teir høvdu bara tveir flogskiparar, so flogfør hevði hann nokk av.

## Frælsishetja ella yvirgangskroppur

Sjeynda dagin hildu vit fram til Santa Clara. Tað var við Santa Clara, at Ché Guevara av álvara meiðslaði navn sítt fast í søguna hjá kubanarum.

Við stórum taktiskum snildi eydnaðist tað Ché Guevara at taka býin 28. desember 1958. Undir veitsluni nýggjárskvøld flýddi kubanski leiðarin Batista, men tá høvdu hansara lívverjar eisini tómt tjóðarbankan. Í Santa Clara hava kubanar reist eina stóra standmynd av Ché Guevara, ið upprunaliga var argentini og útbúgvin lækni, men gjørdist kubanskur borgari. Ché Guevara varð við hjálp frá CIA dripin í Bolivia í 1967.

Á Kuba reistu tey, sum nevnt, eina standmynd av Ché Guevara, og í fyrstu syftu vóru tíðindini tey, at hervaldið í Bolivia hevði beint fyri øllum restum av honum. Seinni vísti tað seg tó, at hetta ikki var so, og kubanskir myndugleikar tóku í 1997 líkrestirnar aftur til Kuba, og Ché Guevara varð, saman við 16 av sínum fylgisneytum, grivin í einum museum, sum liggur í heygginum undir standmyndini.

Fólk eru á ymsum máli um, hvørt Ché Guevara er frælsishetja ella yvirgangskroppur.

Mangir kubanar halda tó sera nógv av Ché Guevara og heiðra hann sum eina frælsishetju, og tá hann varð jarðaður, so asfalteraðu teir vegin "autopista" (motorvegur) heilt frá Havana til Santa Clara bert fyri, at líkrestirnar ikki skuldu meinslast undir flutninginum.

Meðan vit eru við standmyndina, kemur ein motorsúkklufelagsskapur frá Santa Clara at heilsa uppá okkum, og vit taka eina felagsmynd framman fyri standmyndina við 49 súkklum.

Eftir hetta fingu vit heilstoktan grís á einum lokalum bóndagarði. Máltíðin smakkaði sera væl, men av tí at bóndagarðurin lá avsíðis, og vit skulu koyra eftir einum vátum brøttum moldvegi aftur á leiðina til Trinidad, so vóru summi um at koma í óføri. Teir føroysku víkingarnir komu tó snikkaleysar á asfaltið og hildu leiðina fram upp um nøkur sera vøkur fjøll við holutum vegi og tropiskum vøkstri.

Á kvøldi koma vit til "All Inklusive" hotellið Costasur. Seinri um kvøldið fara vit inní býin Trinidad fyri at hyggja eftir einari framførslu á "Casa de La Musica".

## Ganga á vatninum

Her tóku vit okkum av løttum nakrar dagar. Vit svumu í Karibiska havinum, kavaðu við korallriv, vitjaðu koralloyggjar, har bert krabbar og onnur skeljadjór liva.

Sum nógv onnur "charter"-frítíðarstøð bjóðar býurin eitt ríkt náttarlív, har tað hvørt kvøld í vikuni er livandi tónleikur á býartorginum. Ferðalagið vitjar útróðrarbygdina "Casilda", har vit fáa grillaðan hummara og lokalar sigarir. Hetta var fóður fyri fúrstar og annað gott fólk.

Vit vitja eisini eitt stað, har tey venja delfinir, staðið varð kallað "Playa Rancho Luna", delfinhylurin. Vit fáa møguleika at svimja saman við delfinunum. Hetta var ein lívsløta, og tað var kann vekja undran, at hesi dýr kunnu venjast so væl, umframt at síggja teirra atletisku evni fyri ikki at nevna evnini at samskipa. Til dømis klára tvær at hesum delfinum at lyfta ein persón loddrætt út vatninum, líka mikið, hvussu lítið persónurin sjálvur dugir. Tær trýsta undir hvør sítt bein og samskipa trýstið, so persónurin hvørki dettur framyvir ella afturyvir, men stendur loddrætt. Ikki nokk við tí, tær flyta viðkomandi í hesi støðu við tí fúkandi ferð, so hetta má verða tað nærmasta flestu okkara koma til at ganga á vatninum.

Meðan vit dusa okkum her, verður kunngjørt, at Raul Castro, beiggi Fidel Castro, skal taka yvir eftir Fidel Castro.

## Endar av stáli og kubanskar sigarir

Tann 11. dagin vendu vit súklunum aftur móti Havana, og hugtakið "iron butt" - ella á góðum føroyskum ein endi av stáli - fekk meining.

Vit vórðu so eymir um endan av at koyra so langt, at nakrir av okkum eitt skifti valdu at standa uppi og koyra ístaðin fyri at sita.

Komnir til høvuðsstaðin fóru vit á Tropicana, ein náttklubbur ella kabarett, sum er heimskend fyri, at mafian úr Amerika í tíðini frá 1939 fram til kollveltingina brúkti nógvar av sínum fríløtum á hesum staði.

Kuba var ein frístaður fyri mafiuna í nevnda tíðarskeiði. Staðið hevur upprunastílin frá 1939, og meðan 200 dansarar vísa síni kynstur, spælir eitt big band. Á sama hátt um í 1939 fingu harrarnir eina stóra sigar við inngongdina, meðan damurnar fingu eina rósu, og á borðinum stóðu Havana Club fløskur.

## Hemingway og Castro

12. dagin vitjaðu vit á vitjan á staðnum, har høvundin Ernest Hemingway búði, kallað "La Finca Vigia".

Staðið er í dag eitt savn, har tú lærir um lívið hjá Hemingway, meðan hann búleikaðist á Kuba. Vit vitja sjálvandi eisini barrina, har hann plagdi at stytta sær løturnar.

Tað var sera áhugavert at hoyra, hvussu Hemingway skipaði sín gerandisdag í partar, har hann skrivaði, íðkaði motión osfv. Maðurin var væl skipaður í sínum arbeiði.

Hemingway varð av sínum landsmonnum trýstur til at flyta av Kuba og aftur til Amerika eftir kollveltingina, og av tí at hann frammanundan var sálarliga viðbrekin, tí hann leið av tunglyndi, versnaði støðan hjá honum, og at enda gjørdi hann enda á sær sjálvum 2. juli 1961 í statinum Idaho.

## Sonur Guevara fekk Merkið

13. dagin brúka vit saman við tollvaldinum, ið kannar súkklur okkara, so vit hava møguleika at hava nummarpláturnar til dagin eftir.

Seinni koyra vit oman til "Rally" á Malecón, har Oldtimer motorfelagið, nevnt "La Maqorina", hevur stevnu. Átakið er til heiðurs fyri fimm-faldaða heimsmeistaran í Formel 1, Juan Manuél Fangio.

Innan vit fara á staðið, hava vit umrøtt møguleikan fyri at hitta sonin hjá Ché Guevara, ið vanliga ikki vil avmyndast og ikki vil verða eitt alment andlit. Vit hava tosað við ein av okkara kubansku vinum, vanliga nevndur William, ið er presidente fyri motorclasicas og vinmaður við sonin hjá Ché Guevara. Tað eydnast okkum at fáa eitt prát við hann og bera honum eitt føroyskt flagg, umframt at fáa nakrar myndir av hendingini.

## Lakkar móti endanum

Nú er leygardagur 1. mars, og ferðin er um at verða liðug.

Vit koyra motorsúkklurnar, har tær skula pakkast í bingjur, og Michael heitir á okkum fýra úr Føroyum um at loysa ta álitisuppgávu at pakka dýrabara farmin í bingjurnar. Afturfyri bjóðar hann ein góðan bita, tá arbeiðið er liðugt.

Í øllum hitanum herja vit á uppgávuna, og saman við trimum kubanarum verður uppgávan skjótt og væl úr honum greidd. Tá vit hava etið staðfesta vit, at roknað út frá prísinum á máltíðini, so var tímalønin umleið 8 kr. um tíman. Ikki tí, máltíðin var óføra, og vit hugnaðu okkum – har var einki at koma eftir, men upphæddin var neyvan nakað verkamannafeløgini um okkara leiðir høvdu góðtikið. Seinrapartin fara vit á eina rokkkonsert og hava ein "farvæl"døgurða saman við kubanarum.

Mánadagin 3. mars 2008 standa fýra ferðatroyttir menn í Vágum. Nú er gott at vera heima aftur hjá okkara kæru.

Vit hava sæð og upplivað nógv, havt framúr gott vinarlag, ja minnini eru fleiri enn tey, ið rúmast á blað.